# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Rás2 Radio í luftina

Í dag verður farið at senda radio úr Miðlahúsinum. Tað er hálvttriðja ár síðani Sosialurin flutti í Vágsbotn. Flytingin gav nýggjar møguleikar. Geografiska støðan í hjartanum á Føroyum lat upp nýggjar dyr. Blaðið varð keypt frá Javnaðarflokkinum, 80 ára føðingardagur varð hildin fyrr í ár, og í dag er so aftur ein merkisdagur.

Alt hetta er ein náttúrligur útviklingur fyri eina fyritøku sum okkara. Er tað onkur, ið heldur, at vit fáa ikki nokk, vilja fevna um alt og eiga alt, ja entá stýra øllum miðlunum í landinum, so er tað ikki ætlanin. Ætlanin er at yvirliva við at menna seg.

Miðlaheimurin er nógv broyttur. Fyrr var eitt blað eitt blað og so heldur ikki meira. Men tøkni og samskifti eru so nógv broytt, at fylgir tú sum blað ikki við og tekur til tín nýggju møguleikarnar og avbjóðingarnar, kanst tú gerast eftirbátur, og í ringasta føri líða blaðdeyðan.

Vit øll hava stríðst fyri at halda lív í og menna Sosialin. Tað hevur kravt vilja, hegni, dirvi og treiskni. Og tað hevur givið úrslit. Men vit mugu ikki steðga á fyri tað. Tú mást alla tíðina fyrihalda teg til nýggju avbjóðingarnar.

Radio ella útvarp er ein teirra. Longu tá vit fluttu í Vágsbotn fingu vit konsessión til at senda radio. Men vit hava eisini í okkara skjaldramerki at vera varin og fyrireika okkum væl. Tí skuldu tað eisini ganga meira enn tvey ár, til vit mettu okkum tilreiðar at taka hetta stig fult út. Og úrslitið síggja/hoyra vit í dag. Meðan stovuhæddin í Miðlahúsinum umframt til umsiting er til nógva spennandi virksemið við kjaki, upplýsing og mentanarlig tiltøkum, er 1. hæddin arbeiðsplássið hjá journalistum, fotografum og tekniska starvsfólkinum, ið gera blað og tilfar til internetið hvønn dag. Fara vit so víðari upp á ovastu rók, Miðlaloftið, so er har nú studio til radio. Eitt sjáldsamt men spennandi stað, har vit vóna at kunna seta dagsskránna í føroyska miðlaheiminum um ikki hvønn dag so oftani.

Rás2 Radio hjá Miðlavarpinum verður ikki ein havnarrás. Fyri at forða tí hava vit keypt Pegasus í Klaksvík, ið fer at senda saman við studionum í Vágsbotni. Og haraftrat hava vit gjørt íløgur í eina rullandi redaktión, har Stavnur, Snoddi og Snar allir fara at tryggja, at øll tit, sum búleikast úti kring landið, fara at kenna tykkum sum part av okkara samlaða miðlakonsepti, ið byggir á synergiir og á, at journalistar kunnu fáa spennandi avbjóðingar og kunnu arbeiða við fleiri miðlum. Vit fara at gera okkara besta til, at innihaldið verður gott og fjølbroytt.

Men einki radio uttan góð fólk. Eisini tað er hugsað um. Vælkomin til nýggju fólkini og góða eydnu øll somul, starvsfólk sum alt Føroya fólk við hesi spildurnýggju miðlaætlan.

**Sosialurin**

## Flogvøllur í Nólsoy

5. juli 1996 helt ein megnarkvinna føðingardag úti í Nólsoy, har m.o. konan og eg vóru boðin við.

Veðrið var gott, og vit spákaðu okkum heilt út á Borðuna, har vit hugdu at snotuligu húsunum og umhvørvinum har úti. Vit høvdu á orði, hvussu slætt lendið var, og á vegnum innaftur royndi eg at telja fótafetini fyri í fyrsta umfari at meta um, hvussu langur ein flogvøllur møguliga kundi verið á hesum stað, sum liggur líka so tætt upp at Havnini, sum Glyvursnes.

Eg starvaðist tá seinasta árið hjá Landsverkfrøðinginum, áðrenn eg fór frá fyri aldur. Komin á skrivstovuna strikaði eg leið okkara á eitt máliborðsblað í 1:20.000 og vísti táverandi landsverkfrøðingi, Henning Jacobsen, henda møguleika, og helt hann tað vera sera áhugavert; men av tí, at nógv tá var talað og skrivað um at leingja verandi flogvøll ella ikki, helt Henning, sum tann varni skilamaður, hann er, at vit ikki tá skuldu gera støðuna meira fløkta, enn hon var og heldur bíða, til greiða var fingin á verandi vølli. Sum kunnugt varð okkara, bæði her heima og í grannalondunum, høgt metti landsverkfrøðingur tvey ár seinni sagdur úr starvi, og hetta og ivaleyst mong onnur hugskot, sum vórðu løgd at taka til, eru tískil ongantíð tikin fram aftur; men tað gleðir meg almikið, at hugskotið nú er komið fram aftur av heilt nýggjum, væl gjøgnum arbeitt at síggja til, og leggur tú hetta oman á gomlu skitsuna, fella báðir vallirnir saman av tí, at kósin er so einfald og eyðsýnlig.

Einasti munurin er, at eg ikki hevði hugsað um eina tvørbreyt, og at eg fyri at stytta um longdina legði undirsjóvartunnilin so lágt á haga, sum gjørligt og inn á Glyvursnes; men tað var uttan nakra forkanning.

Um so er, at nýggjur flogvøllur skal gerast, so fær hugskotið hjá Magnus Hansen, akitekti, soleiðis við hesum mín fulla stuðul at kanna út í æsir, og vil eg mæla til fyrst av øllum at útvega fígging til kanning av vindi, hvirlum, veðurlíkindum og flogtekniskum viðurskiftum í heila tikið, áðrenn farið verður í aðrar tekniskar smálutir. Vindmátingar eru gjørdar í Nólsoy; men tær eru mest ætlaðar til onnur endamál.

Eitt er vist, at um ikki nakað flogtekniskt er til hindurs fyri hesi ætlan, so fæst her hin longsta flogbreytin í Føroyum, og afturat hesum ein tvørbreyt, sum kann verða líka long ella longri enn allar hinar, talan er um.

Við tílikum flogvølli hevði allur fiskur, um rætt varð atborið, kunnað verið flogin næstan beint úr sjónum og til brúkaran, og tað hevði verið til annan prís enn tann í dag.

**Heini Olsen er fyrrv. deildarleiðari í vegaprosjektering hjá Landsverkfrøðinginum**

## Demokratia, ein íðin kveikjari fyri javnstøðu í politikki

**- ein viðmerking til søgufalsan hjá Høgna Hoydal**

**HANS PAULI STRØM**



Eg eri ein av teimum sum eri fegin um kveikjandi virksemið hjá nevndini Demokratia, ikki minst tí eg kenni nakað av politiskum faðirskapi at hesi góðu nevnd. Tí má eg tala at teirri søgufalsan, sum kemur fram í grein hjá Høgna Hoydal um javnstøðupolitikk. Har sigur Høgni, at tað vóru tingkvinnurnar Heidi Petersen, Annita á Fríðriksmørk og Lisbet L. Petersen sum "tóku stig til átakið við Demokratia".

Upprunin til Demokratia var í Útnorðurráðnum, meðan Lisbet L. Petersen var forkvinna har. Hon tók stig til at fáa samtykt eina sonevnda rekommendation ella tilráðing frá Útnorðurráðnum til tingini í Føroyum, Grønlandi og Íslandi, um at seta eina nevnd at arbeiða fyri øktari kvinnuluttøku í politikki.

Tí kom henda tilráðingin í løgtingið sum uppskot til samtyktar, og varð samtykt 18. nov. 1999.

Tíverri gjørdu landsstýrissamgongurnar við Tjóðveldinum onki við hesa løgtingssamtyktina. Tað var ikki fyrr enn undirritaði og Lisbet L. Petersen komu í samgongu í 2004, at eg sum avvarðandi landsstýrismaður á økinum tók málið upp. Á vári 2005 var uppskotið orðað til at seta nevndina. Tað tók nakrar mánaðir at fáa undirtøku fyri uppskotinum. Rúna Sivertsen hjálpti væl til við hesum.

Einans eitt umboð fyri Miðflokkin atkvøddi ímóti, tá løgtingið t. 20. okt. 2005 samtykti, at landsstýrismaðurin skuldi "seta eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir." Avgjørt varð samstundis hvussu nevndin skuldi skipast, hvør arbeiðssetningurin skuldi vera og hvussu arbeiðið skuldi fíggjast.

Frá 1. jan. 2006 kom málsøkið javnstøðumál undir vinnumál, og var tað landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, sum setti forkvinnuna og nevndarumboðini, sum fingu til uppgávu at at útinna arbeiðssetningin og endamálið: at økja um kvinnuleiklutin í politikki.

Sjálvur haldi eg, at tað er eydnast Demokratia á framúrskarandi hátt at sett týdningin av javnstøðu í politikki á breddan í almenna tjakinum og í politiska lívinum. I heyst fer Demokratia eisini at koma við síni frágreiðing og tilmælum til landsstýrismannin um neyðug átøk fyri fremja málið: at økja um kvinnuluttøkuna í politikki. Tað eri eg spentur uppá og vóni eg, at veljararnir og politiska skipanin fer at taka væl ímóti tí, sum Demokratia fer at koma við.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.